# Øvundin forkemur Skálafjarðartunlinum Sandoyartunnilin tí settur á síðurás

JÓGVAN VIÐ KELDU



Skal viðsjónsætlanin 2015 gerast veruleiki, er altavgerandi, at givið verður loyvið at vinna pening hjá framtakshugaðum fólki.

Tann, sum hevur fingist við eitt sindur av hvørjum í politikki, skilur væl støðuna hjá Gerhardi Lognberg, sum hóast støðugt trýst hevur staðið sum ein maður.

Hevði ikki ætlað mær út í hetta kjakið, men eg haldi tað vera ovboðið, tá formaður í tingbólki Javnaðarfloksins gevur Gerhardi skuldina, um Sandoyartunnilin ikki kemur.

Sosialistiska samgongan hevði ikki meira enn tikið við, tá øvundin gav seg til kennar. Teir ræddust, at onkur vann pening við nýhugsan, egnum framtøkum og visjónsríku Skálafjarðarætlanini. – Meiri umráðandi var at køva eina menning í góðari tíð.

Hvørki Vágatunnilin ella Norðoyatunnilin komu av visiónsríkum landspolitikarum, men av teirri orsøk, at "neyðin lærdi nakna kvinnu at spinna". Skuldu Vágoyggin og Norðoyggjar mennast, var neyðugt við føstum sambandi. Tað sá fólkið í økjunum.

**Sólskinssøgur**

Mótstøðan, sum var tá, er tagnað, ja, mótstøðufólkini tá, halda seg ídag enntá hava verið fyri, eru aftur at finna millum provinsiellu og visiónsleysu politikararnir, sum liva í dreymum. Hóast nýtt ættarlið stingur seg upp, er søgan tann sama.

Tá vit so hoyra formannin í tingbólkinum hjá Javnaðarflokkinum siga, og onkur annar samgongupolitikari við honum, at "gongur Gerhard ikki undir tað, sum tunnilsbókurin er komin til, so er tað tí, at hann vil forkoma tunlinum"!

Synd er at siga, at hann yvirmetir føroyingin! Sjálvur trúgvi eg, at eina valdømið og sentralisman við hesum, fær alt meiri ávirkan, so kunnu serkønir siga tað mótsatta.

At Vágatunnilin og Norðoyatunnilin eru sólskinssøgur, hevur gjørt, at sjálvt mótstøðufólkini nú fagna hesum, og tað er gott! Sandoyartunnilin verður sama sólskinssøgan og er tvingandi neyðugur. Kemur hann ikki nú, kemur hann ikki!

Gevið Gerhard og harvið ikki bert Sandoynni men føroyska samfelagnum samfelagshond!

**Vinnumálaráðharrin og løgmaður**

Ein áheitan á vinnumálaráðharran, ið átti at hugsað vinnuligt, og tí latið okkara fólk fingið frið til at vunnið nógvan pening: lat m. a. visjónsfólkið í skálafjarðarbólkinum hava frið at loysa hesa týdningarmiklu verkætlan úr lagdi, teir eru byrjaðir, og tak tær av Sandoyartunlinum. Halt uppat at køva framtakshugin hjá okkara landsmonnum.

Hyggja vit at "visjónsætlanini 2015", sum løgmaður var spentur uppá, so fer hon bert út í sandin, um køvandi hendurnar verða lagdar á hvørt átak, sum gevur meiri pening til tann virkisfúsna, enn løgmaður og hansara samhugsandi kundu hugsa sær.

So leingi sum føroyingur hevur hesa primitivu og provinsiellu hugsan, koma vit ikki úr stað!

# Næmingar í Sankta Frans Skúla hittast aftur



**Í sambandi við at skúlanæmingar sum gingu í Sankta Frans Skúla til 7. flokk í 1967, hava ætlanir um at hittast aftur í 2008, hava vit fingið mynd og tekst frá Helga Joensen og Fríðgerð Mouritsen, sum fara at samskipa tiltakið**

Nú 40 ár eru liðin, síðan vit fóru úr Sankta Frans Skúla, er ætlanin at vit øll, bæði gentur og dreingir, møtast aftur fyri at minnast aftur á gamlar dagar og annars at hugna okkum.

Fyrireikingarnar eru byrjaðar, og fyri at tað skal bera til hjá helst øllum at vera við, verður hugsað um, at dagurin skal vera 30. desember 2008.

Síðan vit fóru úr skúlanum, eru vit farin í allar ættir, og vit vita ikki í dag, hvar øll búgva.

Vit vilja tí á hendan hátt siga tykkum frá tiltakinum, og biðja tykkum um at senda okkum navn og bústað v.m.

Onkur er kanska sum ikki sær hesa eftirlýsing. Tí heita vit eisini á familju ella vinfólk um at siga teimum sum t.d. búgva uttanlands frá hesari eftirlýsing.

Tit kunnu ringja til Helga Joensen, tel. +298 217616. mail: hvitanes@gmail.com ella Fríger\u00f0 Mouritsen, tel. +298 315154 ella +298 583520. mail: frigerd@kallnet.fo. Seinasta freist at tekna seg er 1. november 2008.

Vónandi frætta vit skjótt.

**Genturnar í 7.b skúlaárið** 1966/67 vóru: Britta Andrea Bendtsen, Edna Cecilia Brockie, Hanna Elisabeth Dam, Johanna Elin Hammersheimb Debess, Malena Mina Enghamar, Anna Hansen, Frígerð Hansen, Marna Skylv Hansen, Annika í Jákupsstovu, Marjun Hanusardóttir Jensen, Hallgerð Joensen, Bjørg Súsan Larsen, Annvør Laura Lávík, Marjun Esther Lindenskov, Borgarhjørt Kragesteen, Ida Bendix Mikkelsen, Guðrun Rein, Súsanna Elna Joensen, Edna Jacobina Simonsen, Elsa Johanna Rasmussen, Anna Maria Vilhelmsen, Sunrið Berg Vilhelmsen, Eyð Sigrun Vørðstein, Kristina Enghamar, Súsan Lind

**Dreingirnir í 7.a skúlaárið** 1966/67 vóru: Hans Andreas Dam, Høgni í Dali, Sámal Hammersheimb Debess, Regin Hansen, Niels Johannes Hansen, Ragnar Hansen, Henrik Hilligsøe, Helgi Joensen, Jógvan Joensen, Jóanes Sekjær Nielsen, Regin Herup Olsen, Erik Krogh Olesen, Snorri Poulsen, Steingrím Samuelsen, Kolbein Simonsen, Kenneth Stampe, Ólavur Øster, Jón Ellendersen og Michael Detrekøy.